SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

TÍÐINDI

# Ung i Norden av bakkastokki

**Mikumorgunin var setanin av risastóru norðurlendsku ungdómsráðstevnuni Ung i Norden á Læraraskúlanum. Tær báðar, Kamilla Ravnsfjall á klaver og Connie Kass við sangi og saxofonspæli, runabundu áhoyrarafjøldina, og um hatta verður støðið á stevnuni kunnu vit gleða okkum.**

UNG I NORDEN
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Mikumorgun er, og Føroya Læraraskúli prýddur í stásiligum veitslubúna. Kreativu kreftirnar hjá føroyskum ungdómum hava gjørt um seg seinastu dagarnar, og seta tær sín serstaka listarliga og litfagra dám á umhvørvið har 218 ung úr øllum norðurlondum hittast næstu vikuna. Oman eftir gongini liggja risastór dekk við reydligum pútum, sum fólk kunnu sita á. Lutir í gulli og messing hanga í stóru vindeygunum, og størri lutir, allir í gulli, standa her og har - millum annað ein gullsúkkla og ein gullsofa Uppgávan hjá teimum ungu norðurlendingunum verður at lovprísa skapanargleðina og at samstarva um kreativar tilgongdir av alskyns slag.

### Rúnabindandi tónar

Undir setanini av stevnuni var fullsetta læraraskúlahøllin fullkomiliga tikin av bóli longu undir fyrstu framførsluni. Salurin fagnaði ungu tónleikakvinnunum Kamillu Ravnsfjall á klaver og Connir Kass, tá hon við inniligum saxofontónum og ikki minst sermerktu rødd síni rúnabant áhoyrarafjøldina undir framførsluni av vøkru vøgguvísini hjá Terja Rasmussen, Hákunardrongurin.

Seinstu dagarnar hevur formanskapurin í Norðurlandaráðnum verið á vitjan í Føroyum, og vóru teir 13 limirnir, við fylgjum, bodnir við til setanina. Undir liðini á mær sat eingin matari enn sjálvur varaforsetin í formanskapinum, ein Harra Lorentzen. Tá framførlan hjá Kamillu var av, snúði hann høvdinum ímóti mær, sá ikki sørt bilsin út, og við piprandi rødd lat í honum: Fantasktisk.

### Hugleiddi um kreativitet

Síðani bjóðaði Jógvan á Lakjuni, landsstýrismaður í mentamálum luttakarum, fyriskiparum og gestum at vera vælkomin á stevnuna, og hugleiddi hann í tí sambandinum um tað at vera kreativur. Eitt nú tók hann støðið í teksti um kreativitet hjá Bob Dylan, har hann sigur, at kreativitetur hevur við royndir, eygleiðingar og hugflogið at gera, og at allir hesir lutir mugu vera til staðar, fyri at vera kreativur.

- Allir hesir lutirnir eru eisini til staðar í Ung i Norden; royndirnar hava tit við tykkum, eygleiðingar fara fram, tá tit møta nýggjum landssløgum og andlitum, og síðani kemur hugflogið helst av sær sjálvum, segði hann.

Og hann vísti á, at tað er eingin loyna, at sólin er gul, grasið grønt og luftin blá. Men, at tað er í tí kreativu tilgongdini, at fólk vísa okkum nakað nýtt og ikki frammanundan kent, og at tað er í sjálvari tilgongdini, ikki í endaliga úrslitinum, at gandurin uppstendur og at tað møguliga verður til list.

– Og kanska verður tað soleiðis, at tá stevnan er av, fara vit at uppliva, at sólin er blá, havið grønt og grasið gult, segði Jógvan á Lakjuni at enda.

Næstur á skránni var grønlendski tónleikabólkurin Olsens Kids, sum vísti okkum eina øðrvísi framførslu, við einum løgnum, men stuttligum lagi, ið minti um eina blanding av grønlendskan trummudansi og hip-hop á grønlendskum.

At enda kom ein spinkul genta niðan á pallin og við sær hevði hon eina veldiga saxofon, sum hon var alt ov lítil til at orka at bera. Eva Rosa er úr Noregi, og vóru tað sannir gandakendir tónar, sum komu úr stóra ljóðførinum, hjá lítlu krúnrakaðu gentuni við teimum stóru brillunum. Varligu og dempaðu tónarnir mintu mest av øllum um Norður Atlantshavið ein ísakaldan og stillan vetrardag, saman



*Connie Kass og Kamilla Ravnsfjall tóku fullsettu læraraskúlahøllina av bóli við hjartanemandi tónum*

---

Limskapur í Norðurlandaráðnum:

# Løgfrøði eingin forðing

**Ongin løgfrøðilig forðing er fyri fullum sjálvstøðugum limaskapi í Norðurlandaráðnum, á jøvnum føti við hini Norðurlondini. Hetta vísir serfrøðingakanning, sum er løgd fyri løgtingsumboð og landsstýrið í hesum døgum. Ole Stavad, formaður í Ráðnum sigur, at tað nú bara er ein politiskur spurningur um fullan limaskap. Eingin forðing er heldur millum Danmark og Føroyar.**

NORÐURLANDA-RÁÐNUM
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Formansskapurin í Norðurlandaráðnum vitjar í Føroyum í hesum døgum og hevur havt fund við bæði umboð fyri løgtingið og landsstýrið. Eitt av høvuðsmálunum, sum hevur verið frammi, er kravið frá føroyingum um sjálvstøðugan limaskap í Norðurlandaráðnum. Ole Stavad, fyrrverandi danskur ráðharri, er formaður í Norðurlandaráðnum. Hann sigur við Sosialin, at orsøkin til at fundurin er lagdur í Føroyum, er nettupp spurningurin um føroyska limaskap.

Ein stór serfrøðingafrágreiðing er gjørd um málið við serligum atliti til ta løgfrøðiligu síðuna av málinum, og í hesum sambandi hevur Frederik Harroff professari verið við til fundarnar í Havn, har hann hevur greitt frá teimum løgfrøðiligu spurningunum rundan um fullan føroyska limaskap.

Ole Stavad sigur, at niðurstøðurnar um løgfrøðina í sambandi við limaskap eru so mikið greiðar, at tað nú bert er ein politiskur spurningur, um Føroyar og aðrir minnilutar kunnu fáa fullan sjálvstøðugan limaskap í Norðurlandaráðnum.

- Tað er einki, sum løgfrøðiliga forðar fyri, at man politiskt tekur avgerð um at gjøgnumføra fullan limaskap fyri tey sjálvstýrandi økini í Norðurlondum. Tað er sera áhugavert at hoyra serfrøðingarnar greiða frá, hvussu langt fólkarætturin hevur flutt seg, síðani man í byrjanini av 80-árunum hevði orðaskifti um og kanningar av hesum málinum. Tí kann eg bert siga, at hetta nú er ein politiskur spurningur aleina, og at politikarar tí ikki longur kunnu vísa málinum aftur við at vísa á, at limaskapur løgfrøðiliga ber ikki til. Slíkar umberingar



*Ole Stavad, formaður í Norðurlandaráðnum hittir Bjarna Djurholm, varaløgmann, sum eisini varar av norðurlandamálum í Tinganesi. Mynd Jens K Vang*

rigga ikki longur.

Ole Stavad sigur, at tað nú er spurningurin, um tað fæst politisk undirtøka í øllum Norðurlondum fyri limaskapi. Hetta krevur so broytingar í Helsingforsavtaluni, og hon kann bert broytast við konsensus tvs. at allar stjórninar mugu vera 100% samdar.

Ole Stavad sigur víðari, at tað er ikki nøkur greið mynd av í løtuni, hvussu tey einstøku londini vilja fyrihalda seg til nýggju støðuna. Fundurin, sum samstarvsráðharranir høvdu fyrr í ár, gav ikki nakað úrslit, tí man hevði meira hug til at skjóta málið út til hornaspark.

Danski formaðurin í Norðurlandaráðnum sigur seg skilja, at tað kanska ikki er fullur konsensus har í løtuni, tá hugsað verður um eitt nú samarnar. Annars má metast, at tað serstakliga eru Finland, Svøríki og Noreg, sum vilja vera varin.

Annars heldur Ole Stavad, at vit eiga at fegnast um, at tað nú er møguleiki at finna eina semju millum landsstýrið og løgtingið øðrumegin og donsku stjórnina og Fólkatingið hinumegin, soleiðis at tað verða ikki viðurskiftini millum Danmark og Føroyar, sum koma at forða nøkrum. Tað verður harafturímóti ein spurningur um, hvat hini norðurlondini siga.

-Er tað spurningurin um álendingar og samarnar, sum kann vera forðingin fyri eini politiskari loysn?

-Tað kann eg ikki siga í løtuni, tí vit hava ikki fingið nakrar greiðar útmeldingar um tað.

-Kann føroyskur limaskapur í EFTA léttari geva okkum limaskap í Norðurlandaráðnum?

-Tað trúgvi eg ikki. Kanska heldur beint øvugt. Kunnu Føroyar fáa fullan limaskap í Norðurlandaráðnum, so kann tað væl gerast ein "murbrækker" fyri føroyskari sjálvstøðugari luttøku aðrastaðni eisini.